**Setanarrøða hjá Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, á savnsdegnum í Virkinum á Sandi, 8. november 2024**

Góðu savnsfólk

Takk fyri høvið at seta savnsdagin, og takk fyri at tit - Sands Bygdarsavn og Tjóðsavnið – hava tikið stig til at skipa fyri degnum. Tað er týdningarmikið, at vit av og á steðga á og meta um, hvørt setta kósin er tann rætta, ella tørvur er á at seta út í kortið av nýggjum. Evnið fyri dagin – avbjóðingar og møguleikar hjá bygdasøvnunum – er serstakliga áhugavert.

Bygdasøvnini hava í meira enn hálva øld virkað kring alt landið.

Sands Bygdarsavn varð sett á stovn í 1988 av Sands Fornminnafelag og Sands bygdarráði í felag - við tí endamáli at fremja varðveitingararbeiði av fornminnum og forngripum, serliga býlingin í Koytu og handilshúsini hjá gamla Mouritsi.

Sands Fornminnafelag gav í nógv ár út væl umtókta tíðarritið Kvørnina, sum hevur verið ein týðandi miðil til at varðveita vitanina um siðsøgu og bygdarsøgu á Sandi.

Sands Bygdarsavn verður, eins og flest onnur bygdasøvn, fyri størsta partin rikið við sjálvbodnum arbeiði, og úrslitið av hesum týðandi arbeiði er at síggja um alt landið, har søgulig hús og býlingar eru varðveitt eins og gripir og frásagnir eru til skjals fyri eftirtíðina. Takk fyri tað - tykkara partur liggur í øllum førum ikki eftir.

Tá bygdasavnslógin kom í 1972, var tað fyri at stuðla teimum feløgum og kommununum, ið longu høvdu tikið stig til at skipa fyri bygdasavnsvirksemi. Í viðmerkingunum til bygdasavnslógina verður víst til Kálvalíð í Miðvági, Norðoya Fornminnisfelag og Fossá og Gøtu Fornminnisfelag og Blásastovu.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur: Endamálið við lógaruppskotinum er at veita bygdasøvnum, sum longu eru farin undir at savna saman og framsýna gripir og at varðveita ávís fornminni, almenna viðurkenning og stuðul at stimbra felagsliga og kommunala hugin at seta á stovn bygdasøvn, tiltøk sum fara at fáa alstóran týdning fyri mentunarsøguliga upplýsingararbeiðið runt um í landinum, umframt teir nýggju møguleikar, sum her verða skaptir fyri at bjarga gripum og fornminnum undan týning.

Hildið varð í 1972, at tørvurin á bygdasøvnum - í hvussu er einum í hvørji sýslu - var til staðar, og at møguleiki átti at verið fyri at skipa tílík sýslusøvn við fyrimynd í fólkabókasøvnunum, sum vórðu skipað sambært fólkabókasavnslógini frá 1968, og sum í síni tíð var eitt stórt frambrot. Vóru fleiri bygdasøvn í somu sýslu, var ætlanin, at bygdasavnsvirksemið í sýsluni skuldi samskipast.

Fyrstu árini eftir at bygdasavnslógin kom í gildi, vórðu ikki so nógv bygdasøvn sett á stovn, men við lógarbroytingini í 1986, tá stuðulin frá landinum hækkaði upp í 60 % av rakstrarútreiðslunum, kom gongd á. Nevnt var í viðmerkingunum til lógarbroytingina um tann alstóra týdning, ið rakstrarstuðulin frá landinum hevði havt fyri menningina av fólkabókasøvnunum.

Í dag eru 23 bygdasøvn góðkend at fáa stuðul sambært bygdasavnslógini, og onnur fáa stuðul beinleiðis á Løgtingsfíggjarlógini. Sýslurnar eru sum kunnugt 6 í tali, so tankin um at samskipa bygdasavnsvirksemi í sýslunum hevur ikki vunnið frama.

Við eini savnslóggávu, ið hevur meira enn hálva øld á baki, er spurningurin, um vit í Føroyum hava eina skipan, ið tryggjar, at søvnini hava røttu karmarnar fyri at kunna gagnnýta teir møguleikar, ið søvn hava fyri at røkja sín týðandi samfelagsliga leiklut.

Altjóða rákið á savnsøkinum er, at søvn skulu vera viðkomandi í síni samtíð og víst verður á týdningin, ið søvnini hava fyri samfelagið, ið tey virka í – bæði tann mentanarliga, búskaparliga og sosiala týdningin.

Samlingarnar eru grundarlagið fyri savnsvirkseminum, og tað hevur tí alstóran týdning fyri varðveitingina av mentanararvinum fyri eftirtíðina, at samlingin verður handfarin á fakliga høgum stigi, og at goymsluviðurskiftini eru nøktandi.

Sum kunnugt var blámusoppur staðfestur á goymsluni hjá Tjóðsavninum í Brekkutúni fyrr í ár. Bráðfeingis tiltøk eru sett í verk at reinsa og flyta savnsgripirnar úr goymsluni, og nú verður arbeitt við at finna eina varandi loysn til goymsluna hjá Tjóðsavninum. Allarhelst verður talan um nýbygning til endamálið, tí tá ber til at skapa so góðar umstøður sum gjørligt fyri savnsgripirnar.

Tað er ikki bara á Tjóðsavninum, at goymsluviðurskiftini eru ein avbjóðing. Tað er torført hjá søvnum at hava nøktandi goymsluvirðurskifti til ymisk sløg av gripum. Aðrastaðni eru søvn tá farin í samstarv um felags goymslur, ið varðveita savnsgripir fyri fleiri søvn undir einum taki.

Menningarmøguleikarnir hjá bygdasøvnunum eru stórir, ikki minst tá tað snýr seg um tænastur til ferðafólk, til børn og familjur og tænastur til fólk við heilsuligum avbjóðingum av ymsum slagi, men fortreytirnar eru, at søvnini eru fakliga væl grundað við viðkomandi framsýningum, og at søvn eru atkomulig kring alt landið. Skal tað lata seg gera, er tørvur á at bygdasavnslógin við galdandi stuðulsskipan verður endurskoðað.

Hóast fleiri royndir gjøgnum árini hava verið gjørdar at dagføra lóggávuna á savnsøkinum, so hevur tað ikki borið á mál enn.

Tá bygdasavnslógini kom í gildi í 1972, var íblástur sum nevnt fingin úr bókasavnslógini.

Tann 1. januar í ár kom nýggj bókasavnslóg í gildi. Sambært bókasavnlógini skulu fólkabókasøvnini fremja upplýsing, lærdóm, talgilda búgving og luttøku í mentanarlívinum og samfelagnum sum heild.

Endamálið við nýggju bókasavnslógini er at tryggja, at allir borgarar í landinum hava atgongd til fólkabókasavnstænastur á fakliga høgum stigi.

Møguliga kann bókasavnslógin enn eina ferð geva íblástur til eina nýggja bygdasavnslóg – eina bygdasavnslóg sum tryggjar atgongd til søvn á fakliga høgum stigi kring alt landið.

Eg ætli at taka arbeiðið við savnslóggávuni upp aftur í komandi ári – tað hava tit savnsfólk, vit myndugleikar og alt Føroya fólk uppiborið.

Takk fyri innbjóðingina til savnsdagin í dag. Eg gleði meg til at hoyra meira um teir møguleikar og tær avbjóðingar, ið tit savnsfólk síggja fyri framman fyri føroysku bygdasøvnini.

Góða eydnu við savnsdegnum!

**Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum**